SP/F TVÁTTUR
480 SKÁLI
FØROYAR

Argir hin 14. oktober 2010
Málsnr.: 10/00429-5
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Heidi Hansen

# Umhvørvisgóðkenning
# av
# Vaskarínum Sp/f Tváttur á Skála

Henda umhvørvisgóðkenning av vinnuliga vaskarínum Sp/f Tváttur, matr. nr. 215b á Skála, er givin við heimild í § 29 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, sum broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008, og § 1, nr. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna, sum broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007.

## 1 Endamál

Endamálið við umhvørvisgóðkenningini er at fyribyrgja og avmarka dálking av náttúru og umhvørvi og ampum, sum kunnu standast av virkseminum.

## 2 Umsóknin

Umhvørvisstovan fekk hin 3. juni 2010 umsókn um umhvørvisgóðkenning frá virkinum Sp/f Tváttur til vinnuligt vaskarí.
Saman við umsóknini hevur Umhvørvisstovan móttikið frágreiðing um arbeiðsgongd, upplýsingar um vaskimaskinur, turkitrumlur og databløð um sápurnar, ið virkið nýtir. Eisini er móttikið matrikulkort, kort yvir kloakkskipan og eitt yvirlitskort. Umhvørvisstovan hevur eisini verið á vitjan hjá Sp/f Tváttur í sambandi við umsóknina.
Tað móttikna tilfarið og upplýsingar, sum komu fram á vitjanini (mál nr. 10/00429-3), hava verið grundarlag undir viðgerðini av umsóknini.

## 3 Lýsing av virkinum

Virkið er á matr. nr. 215b á Skála í Runavíkar kommunu. Arbeiðsgongdin er tann, at klæðir, ið verða heintað hjá kundanum, verða skild og vátreinsað. Klæðir, ið verða nýtt innan matframleiðslu, m.a. frá fiskavirkjum, verða eisini sóttreinsað. Síðani verða klæðini turkað, pressað/strokin, løgd saman og koyrd út aftur til kundan. Virkið væntar at vaska umleið 700-800 kg av klæðum um vikuna.

umhvørvisstovan · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Tlf: +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01· us@us.fo · www.us.fo

## 4 Lýsing av umhvørvisviðurskiftum

Virkið kemur at hava spillivatn frá vaskingini, sum inniheldur sápurestir. Spillivatnið verður leitt gjøgnum plastrør út í ein brunn, og síðani leitt út í tað kommunalu spillivatnsleiðingina og ført út á sjógv undir vatnskorpuni.
Av tí, at virksemið ikki er so stórt, metir Umhvørvisstovan tað ikki verða neyðugt við spillivatnskanningum, men treyt verður sett um at velja reingerðarevni, ið hava minst møguliga ávirkan á umhvørvið.
Á vitjanini (mál nr. 10/00429-3) bleiv staðfest, at virkið ikki hevur nøktandi goymslumøguleikar til kemikalium. Tí verður freist sett fyri, nær virkið skal hava fingið kemikaliumsgoymslu.

## 5 Viðgerð

Uppskot til umhvørvisgóðkenning varð sent virkinum og Runavíkar kommunu til viðmerkingar tann 21. september 2010. Runavíkar kommuna hevði onga viðmerking, meðan Sp/f Tváttur hevði nakrar viðmerkingar.
Fyrsta viðmerking var viðvíkjandi sóttreinsing. Sóttreinsing er ein partur (eitt modul) av vaskiprogramminum, sum tey nýta til m.a. klæðir, sum verða nýtt innan matvøruframleiðslu. Í seinasta skoli verður eitt kemikalii, ið sóttreinsar, latið útí .
Onnur viðmerking var viðvíkjandi staðsetingini av virkinum. Virkið heldur ikki til í privatum sethúsum, men hava sethúsini og Sp/f Tváttur hvør sítt matr. nr. Einans skrivstovan og klædnagoymslurnar halda til í sethúsunum.
Triðja viðmerking var viðvíkjandi vaskinøgdini. Í uppskotinum stóð, at virkið vaskar umleið 170 kg um vikuna. Hetta er ikki rætt, tí virkið vaskar umleið 700-800 kg um vikuna.
Seinasta viðmerking var viðvíkjandi kemikaliumsgoymsluni. Her boðar virkið frá, at kemikaliumsgoymslan er í gerð.

Undir viðgerðini er serligur dentur lagdur á:

- At umhvørvisdálkandi evni ikki verða leidd út í umhvørvið
- At virkið førir innaneftirlit

## 6 Góðkenningartreytir

Umhvørvisgóðkenningin er givin við niðanfyri nevndu treytum:

### 6.1 Innrætting

6.1.1 Virkið skal verða innrættað og rikið, sum sagt er frá í umsókníni.

6.1.2 Ventilatión frá arbeiðsrúmum og goymslum skal førast uppeftir og minst ein metur yvir takrygg.

6.1.3 Virkið skal nýta vaskievni, sum hava minst møguliga ávirkan á umhvørvið.

6.1.4 Miðast skal eftir at nýta bestu tøku tøknina (BAT[1]), og skal tøka reinsiútgerðin altíð nýtast til fulnar, soleiðis at virkið kann halda øll útlát so lág sum gjørligt**.**

### 6.2 Goymslur

6.2.1 Goymslur av kemikalium skulu vera vardar ímóti regni og vindi.

[1] Best Available Techniques.

6.2.2 Lekar skulu kunna haldast aftur í savningarbrunni ella bakka, sum rúmar innihaldið í tí størsta ílatinum.

6.2.3 Virkið skal innan 1. januar 2011 hava fingið sær eina kemikaliumsgoymslu, ið lúkar treytirnar í punkti 6.2.1 og 6.2.2

### 6.3 Burturkast

6.3.1 Alt burturkast skal handfarast í samsvari við galdandi reglur um burturkast[2] og skal latast til góðkendan móttakara.

6.3.2 Burturkast skal goymast í íløtum ella bingjum, sum eru egnað til endamálið, og skal standa soleiðis, at tað ikki elvir til dálking ella er til ampa.

6.3.3 Reglulig avskipan skal vera av burturkasti soleiðis at goymslurnar ikki gerast ov stórar.

### 6.4 Spillivatn

6.4.1 Einki spillivatn má bera brá av olju ella aðrari dálking.

6.4.2 Alt spillivatn skal leiðast í spillivatnsleiðingina, sum gongur heilt út á sjógv.

### 6.5 Óljóð, ristingar og ljós

6.5.1 Óljóð[3] frá virkseminum má ikki fara upp um virðini í talvu 1.

**Talva 1: Markvirði fyri óljóð - dB(A)**

| Dagur | Tíð | Øki 1 | Øki 2 | Øki 3 | Øki 4 |
|---|---|---|---|---|---|
| Mán – frí | 07.00 - 18.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Ley | 07.00 - 14.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Mán – frí | 18.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Ley | 14.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Halgidagar | 07.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Allar dagar | 22.00 - 07.00 | 70 | 60 | 40 | 35 |

Øki 1: Vinnuøki og havnarøki, har larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 2: Vinnuøki og havnarøki, har minni larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarøki.
Øki 4: Bústaðarøki.

6.5.2 Í tíðarskeiðinum kl. 22-07 kann óljóð (løtuvirði) í bústaðarøkjum (øki 3 og 4) í mesta lagi fara 15 dB(A) upp um omanfyrinevndu markvirði.

6.5.3 Virksemið skal ikki hava við sær ampar av óljóði, íroknað lág- ella háfrekventum óljóði, ristingum, ljósi ella geislingum. Um ampar verða av hesum, skulu neyðug tiltøk setast í verk.

### 6.6 Útleiðing til luft

6.6.1 Virksemið má ikki hava við sær ampar av royki, lukti ella dusti uttan fyri øki virkisins.

6.6.2 Allar útleiðingar til luft skulu førast uppeftir.

6.6.3 Um ampar verða av royki, lukti, dusti ella øðrum, skulu avmarkandi tiltøk setast í verk.

[2] Kunngerð nr. 147 frá 19-10-1995, um burturkast, broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007.
[3] Ásett sum tað ekvivalenta, korrigeraða óljóðsstøðið í dB(A) í viðkomandi økjum sambært kommunalu byggisamtyktini.

## 6.7 Rakstarskráseting/umhvørvisfrágreiðing

6.7.1 Virkið skal skráseta hesar upplýsingar:

- Nøgd av vaskaðum klæðum fyri hvørja viku: dagfesting og nøgd
- Rakstrartímar í árinum
- Árlig nýtsla av sápu
- Burturkastsnøgdir og móttakara
- Rakstrartrupulleikar/óhapp
- Onnur viðurskifti av umhvørvisligum týdningi

6.7.2 Rakstrarskrásetingarnar skulu til eina og hvørja tíð kunnu síggjast av eftirlitsmyndugleikanum og skulu goymast í 5 ár.

## 6.8 Innaneftirlit / Umhvørvisstýrisskipan

6.8.1 Umhvørvisstovan kann krevja, at virkið skjalprógvar, at treytirnar um óljóð, ristingar og ljós, um útleiðing til luft og um spillivatn, verða hildnar.

6.8.2 Um mett verður neyðugt, kann Umhvørvisstovan krevja, at kanningar verða gjørdar av spillivatninum.

6.8.3 Allar sýnistøkur og kanningar skulu gerast av starvsstovu, sum kann góðkennast av Umhvørvisstovuni.

6.8.4 Allar sýnistøkur, kanningar og metingar av úrslitum verða goldnar av Sp/f Tváttur.

6.8.5 Umhvørvisstovan kann krevja, at virkið ger serligar kanningar fyri at meta um møgulig dálkingarárin frá virkinum.

## 6.9 Almennar treytir

6.9.1 Boðast skal Umhvørvisstovuni frá, tá ið farið verður undir virksemið.

6.9.2 Er virksemið ikki byrjað innan eitt ár frá tí at umhvørvisgóðkenningin er lýst, fellur umhvørvisgóðkenningin burtur.

6.9.3 Virkið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið økir dálkingina, uttan nýggj góðkenning er givin.

6.9.4 Henda umhvørvisgóðkenning, við møguligum broytingum og dagføringum, skal altíð vera tøk á virkinum og skulu øll viðkomandi starvsfólk kenna innihaldið og vera kunnað um ta lóggávu, sum góðkenningin er grundað á. Virkið skal altíð tryggja sær, at treytirnar í hesi góðkenning verða hildnar, um neyðugt við at gera egnar mátingar og skrásetingar.

6.9.5 Eigaraskifti, navnabroyting ella avtøka skal fráboðast Umhvørvisstovuni. Um virksemið heldur uppat, skal alt tilfar og øll útgerð beinast burtur.

6.9.6 Umhvørvisstovan hevur eftirlitið við virkinum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.

6.9.7 Í 5 ár eftir at góðkenningin er givin, kunnu nýggjar treytir bert ásetast, um so er, at:

- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingarárin
- dálkingin elvir til umhvørvislig árin, ið ikki vóru kend, tá ið góðkenningin varð givin
- dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir

6.9.8 Aftaná fimm ár kann Umhvørvisstovan broyta treytirnar í hesi góðkenning, tá ið tað er umhvørvisliga grundað.

6.9.9 Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við øðrum góðkenningum.

## 7 Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært § 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, sum broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008, kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðan sendir hana til Innlendismálaráðið við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

Jóhanna Olsen, deildarleiðari

/

Heidi Hansen, umhvørvisviðgeri

**Avrit:** Runavíkar Kommuna, Heiðavegur 26, Fo-600 Saltangará
Landslæknin, Sigmundargøta 5, Fo-100 Tórshavn